## Vit eru nøgdir

**Vit fóru eftir trimum stigum og fingu eitt, men vit eru nøgdir eftir at hava fingið javnt í móti oddaliðnum, segði Bill McLeod Jacobsen eftir dystin móti EB/Streymi**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

B68 berjist fyri lívinum í Formuladeildini, og tað sást eisini aftur á Svangasgarði í gjár.

– Vit fóru eftir trimum stigum og fingu eitt, men vit eru nøgdir nú eftir dystin, har vit spældu 1-1 móti EB/Streymi, greiðir Bill McLeod, venjari hjá B68, frá.

– Tað hevur víst seg hjá øðrum liðum, at tað ikki riggar at grava seg niður og verja móti EB/Streymi, og tí gjørdu vit av at fara fram á vøllin eftir teimum, og tað hevur kanska tikið teir á bóli, sigur vælnøgdi venjarin hjá B68.

– Tað var eisini rættiliga tilvitað, at vit kempa og stríðast so nógv sum vit gera, tí vit vóru greiðir yvir, at EB/Streymur hevur spælt eina rúgvu av dystum seinasta mánaðin, og at teir tí kanska vóru eitt sindur moyrir. Tað royndu vit at koyra upp á, og tað eydnaðist eisini, staðfestir Bill McLeod Jacobsen.

Í gjár fekk B68 altso javnleik í móti EB/Streymi, og áðrenn tað vunnu teir stórt í móti VB/Sumba, so nú sær av álvara út til, at menn trúgva upp á, at teir klára at leingja um tilveruna í bestu deildini við einum ári.

– Tað tekur tíð at venda einum seglbáti sum hesum, men vit hava arbeitt hart seinastu seks vikurnar, og eftir trý keðilig tap á rað sær út til, at tað er vent í holuni, so vit fara at koyra á, tað sum eftir er at spæla, sigur Bill McLeod Jacobsen, venjari hjá B68.



## Todi og teir taptu

Start spældi í gjár ímóti Vålerenda á útivølli í norsku landskappingini. Dysturin, sum var spældur frammanfyri sløkum 14.000 áskoðarum á Ullevaal endaði við 1-0 sigri til Vålerenga. Todi Jónsson sat á beinkinum, men varð sendur á vøllin eitt korter fyri tíð. Todi fekk beinanvegin ein góðan møguleika, men rakti ikki bóltin. Tríggjar minuttir inn í yvirtíðina drønaði David Nielsen bóltin á tvørstongina, men inn fór bólturin ikki.

## Jon Dahl á beinkinum

Danski álopsspælarin Jon Dahl Tomasson hevur mist plássið í álopinum hjá týska felagnum Stuttgart. Um vikuskiftið spældui Stuttgart javnleik ímóti Frankfurt, og Jon Dahl sat á beinkinum allan dystin.

– Tað havi eg onga viðmerking til. Tað er venjarin, sum setir liðið, sigur Jon Dahl Tomasson við danska blaðið BT.

Jon Dahl hevur havt ein skaða í beininum, men hann hevur kunnað spælt seinastu vikurnar.

# Meistaraheitið útsett

B68

EB/Streymur

**Tað er munur á at kempa hart og at spæla smart. Tað mugu sundalagsmenn ásanna, eftir at hava vitjað á Toftum sunnudagin. Við Julian Johnsson á odda stríddi B68 seg til ein javnleik, og eru teir væl ávegis at prógva, at B68 ikki hoyrir heima í 1. deild**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*



*Arnbjørn Hansen endar eitt frágera vakurt álop við at stúta á tvørtræið, og sum heild hevði EB/Streymur teir størru kjansirnar, meðan B68 hevði leikliga yvirvág*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Toftamenn stríðast fyri lívinum í bestu deildini, og tað var eisini tað, sum setti sín dám á dystin á Svangasgarði sunnudagin. Eftir eina nøkulunda javna byrjan, settu toftamenn seg so líðandi á dystin, og at enda sótu teir á øllum.

Hinvegin høvdu teir trupult við at spæla seg framvið Egil á Bø og Knút Vesturtún, og tá Sorin Anghel, Rafal Kwiecinski og Hans Pauli Samuelsen ikki høvdu neyðuga hugflogið til at spæla seg fram til teir opnu møguleikarnar, og Arnbjørn Hansen ikki var nóg neyvur, tá kjansirnar uppstóðu, so var tað bara rímiligt, at toppur og botnur í Formuladeildini býttu stigini sína millum.

### Eitt brotsspark í part

Ikki óvæntað var tað EB/Streymur, ið var naskari fyrstu løtuna. Tá smáir tíggju minuttir vóru spældir var Arnbjørn Hansen nær við, tá hann fluktaði eitt innlegg frá John Hera Dam ímóti málinum, men Tórur Thomssen var vakin og bjargaði væl góða skotinum.

Løtu seinni var Arnbjørn Hansen aftur upp á spæl. Hans Pauli Samuelsen, sum annars ikki hevði ein av sínum bestu døgum, fintaði Jóhan Petur Poulsen av úti í vinstru síðu og setti ferð á. Tá hann nærkaðist baklinjuni legði hann bóltin inn í brotsteigin til Arnbjørn Hansen. Hesin temur bóltin, men verður síðani koyrdur um koll av Øssur Hansen.

Dagfinn Olsen ivaðist ikki, men peikaði á brotssparksblettin, og Egil á Bø skoraði trygt úr ellivu metrum.

Tá fyrri hálvleikur var hálvrunnin var so um reppið, at EB/Streymur økti upp aftur um leiðsluna, tá Arnbjørn Hansen endaði eitt frágera gott álop við at stúta innleggið frá Rafal Kwiecinski á tvørtræið. Eitt framúr gott álop, við nógvum statiónum og góðum detaljum og sum hevði uppiborið betri lagnu.

Hetta gav mongu EB/Streyma-viðhaldsfólkunum vón um, at felagslið teirra fór at koyra sigurin í hús við flottum og ágangandi álopsspæli, soleiðis sum vit so ofta hava sæð EB/Streym gjørt í ár.

Men so var ikki. Restina av fyrra hálvleiki hevði EB/Streymur millum lítið og onki at bjóða upp á frameftir, meðan B68 nú setti seg meiri og meiri á dystin. Teir gjørdust tó ongantíð vandamiklir, og frægastu royndina átti Alex Castilho, tá hann royndi seg úr spískum, men René Tórgarð tók skotið.

Seinni hálvleikur byrjaði við, at Anderson ávaraði EB/Streym við einum skoti sum fór beint upp um. Hesa ávaring tóku teir ríputu ikki til eftirtektar, tí lítla løtu seinni fekk B68 hornaspark.

Bólturin varð lagdur inn fyri, og Súni Fríði Barbá vinnur bóltin, men fer um koll, tá Knút Vesturtún nokkso klossut roynir at vinna bóltin. EB/Streymarnir mótmæltu og ristu við høvdinum, men dómurin stóð við, og Anderson smekkaði bóltin trygt í netið.

### B68 omaná

Hetta málið gav toftamonnum blóð á tonna. Teir fóru nú at trýsta og kempa sum teir sjáldan hava gjørt í ár. Við Julian Johnsson á odda stríddu teir seg til ein javnleik móti oddaliðnum, og tað er eitt frálíkt úrslit við tí í huganum, at B68 fyrr í ár tapti 8-2 fyri EB/Streymi.

B68 var oman á í seinna hálvleiki, ongin ivi um tað. Men tað var so sum so, hvat teir megnaðu at skapa av málmøguleikum. Alex Castilho var hann, sum nærmast við at skora, men Egil á Bø vardi fyri við høvdinum og so spurdist ikki meiri burtur úr.

Undir stórum trýsti, megnaði EB/Streymur tó at koma fram til størsta møguleikan í seinna hálvleiki.

Marni Djurhuus lossaði bóltin burtur úr verjuni, og tað sá Arnbjørn Hansen ein møguleika í og streyk avstað. Hann slapp fram um verjuleikaran og kom inn í brotsteigin, men ivaðist ov longi og so var Øssur Hansen har og takladi bóltin burtur.

Harvið ber til at staðfesta, at B68 hevði leikliga yvirvág, men at EB/Streymur áttu teir stóru møguleikarnar. Tí var tað eisini á eini leið, at liðini býttu stigini sína millum í einum dysti, har EB/Streymur ikki slapp at spæla sítt skjóta, smarta og ágangandi spæl, tí toftamenn stríddust fyri hvørjum einasta bólti og fingu at enda løn fyri stríðið.

## Hatta broyta vit skjótt

Tað var ein fáorðaður René Tórgarð hjá EB/Streymi, vit fingu orðið á eftir dystin.

– Nei, vit spæla ikki upp til tað sum vit megna, og B68-arnir vóru ágrýtnir og stríddust væl, men okkara avrik var bara ikki nóg gott, staðfestir málverjin hjá EB/Streymi.

Spurdur um, hvussu lagið í EB/Streymaleguni nú er, og um tað eru nervarnir, sum spæla inn, sigur málverjin lagið framvegis er gott, og at teir ikki hava fingið nervar.

– Vit hava spælt tveir dystir, har tað ikki hevur riggað so væl hjá okkum, men tað er onki problem, tí hetta broyta vit skjótt, segði René Tórgarð eftir dystin í gjár.

-rwd

## Spældi við brotnum gaggum

EB/Streymur spældi langt frá upp til sítt besta í gjár, og ein av teimum leikarunum, sum var merkiliga lítið sjónskur í mun til vanligt, var Hans Pauli Samuelsen.

Sjáldan royndi hann at bjóða av, og tá hann so royndi seg, misti hann bóltin. Ikki nakað, sum plagar at koma fyri hjá Hans Paula Samuelsen, men nú vita vit hví.

Hans Pauli Samuelsen spældi við brotnum gaggum at kalla allan dystin. Í samband við eitt fríspark í fyrra hálvleiki, har Hans Pauli skuldi skjóta, gleið hann, og tá brotnaðu tveir teir aftastu dobbarnir av, so restina av dystinum spældi víkamaðurin við eini heilari gaggu á vinstra fóti og eini hálvari á høgra fóti.

-rwd